# Nýggj sangbók á marknaðin

**Nýggja sangbókin kallast Okkara Sangbók, og verður hon væntandi at finna á handilshillunum áðrenn ólavsøku. - Ætlanin er, at nýggja sangbókin skal gerast ogn hjá øllum føroyingum - eins og Grøna Sangbók og songbók Føroya fólks, sigur Ernst S. Olsen, fyriskipari.**




*Nýggja sangbókin kallast Okkara Sangbók og kemur út á marknaðin áðrenn ólavsøku: - Enn hava vit ikki endaliga avgjørt, hvussu stórt upplagið verður, men væntandi nakrar túsund, sigur Ernst S. Olsen, fyriskipari.*

MENTAN
*Lív Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*

– Tað er eingin loyna, at vit hava fingið íblástur til Okkara Sangbók frá hinum sangbókunum – Grønu Sangbók og Føroya fólks. Men vit ætla okkum ikki beinleiðis at leggja okkum á tær, og hava vit tí gjørt nýggju sangbókina eitt sindur øðrvísi.

– Eitt nú hava vit útlendskar sangir við. – 'Slagarir', ið verða margfaldaðir í sanghefti til veitslur. Men sjálvandi hava vit eisini allar teir kendu føroysku sangirnir við í Okkara Sangbók, sigur Ernst S. Olsen, fyriskipari.

Hugskotið til nýggju sangbókina kom fyri nógvum árum síðani, men fyrireikararnir fóru ikki miðvíst til verka fyrr enn í februar í ár. Síðan tá hevur Ernst S. Olsen arbeitt burturav við bókini.

– Øll hava verið sera positiv, tá tey hava frætt um nýggju sangbókina. Tað, sum fyrst og fremst hevur sett hana í gongd, er stóri eftirspurningur eftir Grønu Sangbókini. Hon varð útseld á marknaðinum fyri nógvum árum síðani, og síðan tá hevur tørvurin verið sera stórur. Tí hava vit valt at gjørt eina nýggja sangbók, sigur Ernst S. Olsen.

– Men eisini hava vit lurtað eftir, hvat fólk syngja til veitslur, og hvat Útvarpið spælir. At byrja við høvdu vit ein sera stóran bunka av sangum, men síðan hava vit eftir besta førimuni roynt at raðfest, greiðir Ernst S. Olsen frá.

Um 300 sangir verða í nýggju sangbókini. Nýggjar besiffringar (til fylgispæl), ið hóska væl til felagssang, eru gjørdar til allar sangirnar. Og eisini hava allar sangbøkurnar 'spiral' og eitt gott innihaldsyvirlit, sum stendur í stavrað.

### FAKTA

Í høvuðsheitum standa hesir menninir aftan fyri Okkara Sangbók:

Ernst S. Olsen, samskipari
Magni Olsen, ráðgevi
Súni Danielsen, tónlistaligur ráðgevi

### FAKTA

Sangbókin er í alt býtt upp í fýra partar, men aftast í bókini er somuleiðis ein uppseting av 'gittaragrebum'.

Partarnir verða kallaðir soleiðis:
**Føroyingar, sum her nú koma saman** (veitslusangir)
**Barnahjarta alramest** (barnasangir og jólasangir)
**Sertilfar** (borðsangir, sálmar, vísir, tættir og kvæði)
**Í húnarhátt** (tjóðsangir)



*Í næstum koma tvær nýggjar sangbøkur út á marknaðin. Syngið við*

## Nýggj Grøn Sangbók ávegis

**Tann so væl dámda Grøna Sangbókin, ið nærum hvørt húski hevur í húsinum, stendur somuleiðis fyri durum**

MENTAN
*Lív Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*

Tó vil Simme A. Jacobsen, fyriskipari, ikki nágreiniliga siga, nær vit aftur kunnu vænta at síggja eina Grøna Sangbók á handilshillunum:

– Vit eru komin væl ávegis, men eg tori ikki at siga akkurát, nær hon kemur út. Um eg skal geva eitt boð, vænti eg, hon kemur seint í heyst.

– Í løtuni stríðast vit við at seta tað seinasta saman. Nógvir nýggir sangir eru gjørdir, síðan Grøna Sangbók kom út á fyrstan tíð. Næstan allir teir somu sangirnir verða í, men so verða nakrir nýggir lagdir afturat. So nýggja sangbókin verður rúgvusmiklari enn tann gamla. Somuleiðis verður hon betri skipað í allar mátar og bert til keyps við 'spirali', sigur Simme A. Jacobsen.